# Verkfallið: Løgmaður skal sópa fyri sínari egnu hurð

**– Tað er nógv fyri at hoyra Løgmann kasta fakfeløgunum fyri at tey ikki vísa samfelagssinni og ábyrgd. hann skuldi heldur tikið í egnan barm, sigur Ingeborg Vinther**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*

– Løgmaður skuldi heldur tikið í egnan barm

Tað rørir ikki Ingeborg Vinther, at Anfinn Kallsberg í Sosialinum leygardagin heitti á partarnar á arbeiðsmarknaðinum um at vísa ábyrgd og samfelagssinni og at loysa trætuna ímillum arbeiðarafeløgini og arbeiðsgevararnar, so at samfelagið fæst ígongd aftur.



*Tá ið sáttmálaloysi er, hava feløgini rætt at fara í verkfall, so einfalt er tað, sigur Ingeborg Vinther, sum ikki vil hoyra Løgmann tosa um ábyrgd, tí sjálvur hevur hann skyldina av største ábyrgdarloysinum í samfelagnum*

Tvørturímóti heldur forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag, at tað er nógv fyri at hoyra Løgmann tosa um ábyrgd.

– Hann skuldi heldur sópa fyri sínari egnu hurð, áðrenn hann kastar øðrum fyri, at tey ikki vísa ábyrgd. Løgmaður hevur sjálvur í fimm ár sitið á odda fyri eini samgongu, har klandur og stríð hevur verið høvuðseyðkenni so at siga alla tíðina.

– At tey, sum mynda landsins stjórn klandrast so illa, sum tey gera í hesi samgonguni, haldi eg ikki er at vísa ábyrgd og samfelagssinni og hesum hevur Løgmaður ábyrgdina av. Tí er tað nógv fyri at júst hann skal loyva sær at heita á fakfeløgini um at vísa ábyrgd, sigur Ingeborg Vinther.

Hon sigur, at verkafólkið má fáa eina sámuliga løn og tað ber ikki til, tað, sum er farið fram hesi seinastu árini, at arbeiðaralønin dragnar meiri og meiri afturímóti øðrum lønarbólkum.

Løgmaður heldur eisini, at tað er neyðugt at viðurskiftini á arbeiðsmarknaðinum verða betrið skipað?

– Eg veit ikki, hvat hann hugsar um. Eg veit ikki um ætlanin er at taka samráðingarrættin frá okkum ella, hvat hann hugsar um.

Ingeborg Vinther sigur, at royndir eru gjørdar at broyta semingslógina, sum er eitt týðandi amboð á arbeiðsmarknaðinum.

– Tað endaði við, at landsstýrismaðurin í vinnumálum legði eitt uppskot fyri fakfeløgini, men tað var so vánaligt at tað var ikki eitt tað einasta fakfelag, sum tók undir við tí.

– Men kanska er ætlanin bara at skerja rættindini hjá fakfeløgunum? Er tað bara hetta, Løgmaður hugsar um, tá ið hann tosar um at viðurskiftini skulu skipast betri, sigur tað seg sjálvt, at vit fara ikki at góðtaka tað, sigur Ingeborg Vinther.

Annars dugir hon ikki at síggja, at tað er neyðugt við fleiri broytingum.

–Vit halda, at viðurskiftini eru nóg væl skipað. Tá ið sáttmálaloysi er, hava vit rætt at fara í verkfall, so einfalt er tað og hetta er ein rættur, sum fakfeløg hava um allan tann frælsa heimin. Hetta er ikki eindømi fyri føroyska arbeiðsmarknaðin.

Eitt, sum nógv hevur verið tosað um, eru reglarnar fyri frumatkvøðugreiðslu. Arbeiðarafeløgin i hava sagt, at frumatkvøðugreiðslan er ódemokratisk, tí tey, sum ikki taka lut í atkvøðugreiðsluni, verða roknað at hava atkvøtt fyri og tí er tað ógvuliga trupult at fella eitt semingsuppskot.

– Men verkafeløgini hava ikki tosað um, antin tað er nøktandi at broyta tær reglarnar. Men hon vísir á, at aðrastaðni er tað vanligur meiriluti sum ræður.

Annars hevði Føroya Arbeiðarafelag fund fyri limunum kring landið um vikuskiftið og Ingeborg Vinther sigur, at tey fingu fulla undirtøku fyri verkfallinum.

– Vit eru øll hørm um verkfallið, men sum støðan er, varð onki annað at gera, sigur Ingeborg Vinther.

# Fingu freist upp á ein tíma

**– Vit fingu skomm og skitna løn frá alivinnuni afturfyri at vit hava verið so lagalig, sigur Ingeborg Vinther**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*

Mánadagin hevði Havbúnaðarfelagið fund við politikarar um støðuna í alivinnuni, nú verkfall er.

Tað heldur Ingeborg Vinther lítið um.

– Men hetta er kanska tøkkin fyri at vit hava verið so lagalig ímóti alivinnuni, hóast vit hava verið í verkfalli.

Hon sigur, at hóast arbeiðarafeløgini hava verið í verið í verkfalli, hava tey givið alivinnuni so lagaligar sømdir, sum ongantíð fyrr í nøkrum verkfalli.

Hon sigur, at alivinnan hevur fingið undantøk at taka sjúkan fisk og at fáa hann á frystigoymslu, so vit hava roynt tað, sum vit kunnu fyri at gera trupulleikarnar hjá alivinnuni so avmarkaðar sum gjørligt. Og so góðar sømdir, sum alivinnan hevur fingið hesuferð, hevur hon ongantíð fingið fyrr og vit hava verið so lagalig, sum vit yvirhøvur kunnu vera undir einum verkfalli.

– Men vit mugu so bara staðfesta, at takkarlønin er, at Havbúnaðarfelagið fer til politisku myndugleikarnar í eini roynd at fáa teir at leggja uppí okkara verkfall, sigur Ingeborg Vinther.

Hon heldur eisini, at tað er hugvekjandi, at hvørja ferð, verkfall er, veksa trupulleikar við sjúkum fiski og ILA.

### Fingu ein tíma at svara

Hon heldur eisini, at tað er nógv fyri, at havbúnaðarfelagið alment fýlist á, at tað ikki hevur fingið svar frá arbeiðarafeløgunum í verkfalli upp á eina umsókn um at víðka undantaksloyvi til eisini at flyta alifisk av landinum.

– Veruleikin er, at tað var omøguligt at svara.

Ingeborg Vinther sigur, at tey fingu umsóknina frá Havbúnaðarfelagnum klokkan 13 mánadagin og felagið kravdi at fáa svar longu sama dag klokkan 14, ella ein tíma seinni.

– Tað haldi eg er toppmált, tí Havbúnaðarfelagið veit, at tað er ómøguligt. Vit eru fimm feløg, sum eru í verkfalli og ein slík umsókn skal viðgerast av øllum feløgunum og sostatt tekur tað sína tíð at fáa tað viðgjørt. Tí høvdu vit ongan livandi kans at svara.

– Men havbúnaðarfelagið hevur nú fingið tað at ljóða sum um at vit ikki hava viljað svarað og tí vendu tað sær til politikararnar fyri at fáa teir at leggja uppí.

Ingeborg Vinther sigur annars, at nú blivu samráðingar við arbeiðsgevararnar í gjár og tí hava tey ikki viðgjørt umsóknina frá Havbúnaðarfelagnum fyrrenn tey vita úrslitið av teimum samráðingunum.

# Hans Joensen fekk undirskriftir á borðið

**Havnar Arbeiðsmannafelag hevur brotið sínar egnu lógir, nú verkfall er, siga teir, sum hava skrivað undir eitt krav um at fáa limafund ella eykaaðalfund**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*



*Ingeborg og Hans Joensen hava staðið saman í verkfallinum, men endar verkfallið ikki eftir samráðingarnar í gjár, sleppa limirnir í Havnar Arbeiðsmannafelag at siga sína hugsan,*

Nú skal limafundur vera í Havnar Arbeiðsmannafelag um støðuna í verkfallinum Tað hava limir í felagnum sent nevndini í felagnum skrivligt krav um.

Beint eftir døgeverða í gjár handaðu nakrir limir í Havnar Arbeiðsmannafelag nevndini skriv við kravi um antin limafund ella eykaaðalfund av viðgerða verkfallið.

Tað hevur ikki eydnast at fáa at vita, hvussu nógvir limir hava skrivað undir, men tað eru í hvussu so er meiri enn 25, sum er tað ið krevst fyri at fáa eykaaðalfund.

Nakrir av teimum, sum hava skrivað undir, men sum ikki vilja leggja navn til fyri frið skyld, siga, at í veruleikanum hevur nevndin í Havnar Arbeiðsmannafelag brotið sínar egnu lógir í hesum verkfallinum.

Teir vísa til grein 31 í lógunum hjá Havnar arbeiðsmannafelag, har tað stendur, at varar eitt verkfall longri enn 24 tímar, skal málið leggjast fyri limafund at taka støðu til.

Grein 31 er soljóðandi:

Nevndin kann seta í verk arbeiðssteðg (strike), ið tó ikki kann standa við meira enn eitt samdøgur, uttan at verða góðkendur á felagsfundi, ið tessvegna verður samankallaður, og har avgerðin verður tikin við vanligari meirilutaatkvøðu.

Men teir leggja eisini dent á, at tað er ikki hetta, sum hetta kravið um limafund snýr seg um.

– Tað einasta vit vilja, er, at skatta dýpið fyri at vita, hvat limirnir í felagnum siga til verkfallið og um teir taka undir við teirri støðu, sum nevndin hevur tikið, siga teir.

Teir leggja afturat, at tær ætla undir øllum umstøðum at vera fult loyalir í teirri støðu, sum limirnir taka.

– Hetta er ikki fyri at reisa misálit á nevndina, leggja teir stóran dent á. Hetta er bara fyri at fáa eina kunning og fyri at skatta dýpið.

Hans Joensen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag, váttar, at hann hevur fingið undirskriftirnar.

Men hann sigur, at tá hevði nevndin longu tikið avgerð um at halda limafund í felagnum.

Trupulleikin er bara tann, at samráðiungar skuldu vera í gjár og tí verður í fyrsta tað í fyrsta lagi í dag at tað ber til at halda fundin.

Heldur ikki Hans Joensen hevur uppfatað hetta sum eitt misálit á nevndina.

Hann ásannar eisini, at tað stendur í lógini hjá Havnar Arbeiðsmannafelag, at spurningurin um verkfall skal leggjast fyri nevndirnar.

– Vit løgdu ikki semingsuppskotið fyri limirnar í 199, tá ið vit samráddust saman við Klaksvíkingum og tað hoyrdu vit onki fyri. Vit brúktu somu mannagongd í 2001 og heldur ikki tá, hoyrdu vit nakað frá limunum.

Hann sigur, at nevndirnar í hinum feløgunum hava heimild at taka støðu og at tað hevði skapt óneyðugan ruðuleika, skuldi nevndin í Havnar Arbeiðsmannafelag lagt málið fyri limirnar og teir høvdu vrakað tað.



# SEV-stýrið skal standa skúlarætt

**Teir 77 limirnir í umboðsnevndini hjá SEV skulu nú taka støðu til, hvørjar avleiðingar málið um sáttmálan millum SEV og Maskinmeistarafelagið skal fáa. Á komandi fundi skal stýrið geva umboðsnevndini eina frágreiðing um gongdina í málinum, og sum kunnugt eru limirnir í stýrinum ójavnir á máli um, hvat farið er fram**

SEV
*Stefan í Skorini*



*Hans Tausen Olsen, umboðsnevndarformaður í SEV, hevur gjørt av, at umboðsnevndin skal taka støðu til, hvørjar avleiðingar málið um sáttmálan millum SEV og Maskinmeistarafelagið skal fáa fyri leiðsluna og stýrið*

Málið um sáttmálan millum SEV og Maskinmeistarafelagið verður nú tikið við viðgerðar á hægsta stigi. Á tí árliga umboðsnevndarfundinum, sum verður tá verkfallið er av, skal stýrið geva umboðsnevndini eina frágreiðing um, hvat farið er fram í málinum. Fundurin hevur verið á skránni áður, men vegna verkfall er hann útsettur.

Tað er Hans Tausen Olsen, umboðsnevndarformaður, sum fer at leggja hetta málið fyri umboðsnevndina.

Hann heldur, at mannagongdin í málinum, tá SEV gjørdi sáttmála við Maskinmeistarafelagið, er so ivasom, at málið má leggjast fyri umboðsnevndina til støðutakan.

Hann fer at mæla til, at SEV gerst limur í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum, so at komandi samráðingar ikki verða førdar av SEV. Harvið missir leiðslan í SEV samráðingarrættin. Hetta skal forða fyri, at ein slík støða aftur kemur fyri.

Sum skilst er hetta eitt sera ógvusligt stig at taka, men Hans Tausen Olsen heldur, at hetta er neyðugt.

### Ósemja í stýrinum

Sum skrivað varð í blaðnum í gjár, so eru stýrislimirnir ikki á einum máli um, hvørja kunning teir fingu á fundinum tann 28. mars. Dagin fyri hevði leiðslan á SEV verið á fundi við Fíggjarmálaráðið, har hon fekk at vita, at Karsten Hansen ikki fór at góðkenna sáttmálan. Umboð fyri SEV á tí fundinum vóru Poul Arni Jacobsen, stýrisformaður, Klæmint Weihe, stjóri, og John Danielsen, skrivstovustjóri.

Dia Poulsen, sum umboðar Suðuroynna í stýrinum, førir fram, at hann ikki var kunnaður um, at Karsten Hansen ikki fór at góðkenna sáttmálan. Visti hann tað, hevði hann ikki givið formanninum heimild at skriva undir við Maskinmeistarafelagið.

Kristian Fríðrik Olsen, næstformaður í stýrinum, sigur hinvegin, at hann fekk nøktandi kunning, og at hann visti av, at Karsten Hansen dagin fyri hevði sagt, at hann ikki fór at góðkenna sáttmálan.

Teir sjey stýrislimirnir skulu nú greiða umboðsnevndini frá, hvussu alt er farið fram.

### Brot á lógina

Spurningurin er so, hvør fer at sita eftir við svartaperi. Um stýrislimirnir vistu av, at Karsten Hansen ikki fór at góðkenna sáttmálan, men kortini hava givið formanninum heimild at skriva undir, so er spurningurin, um hetta ikki er brot á kommunustýrislógina.

Hon sigur nevniliga greitt, at landsstýrismaðurin skal góðkenna slíkar sáttmálar. Vistu stýrislimirnir av hesum, hví góvu teir so formanninum heimild at skriva undir?

Um stýrislimirnir hinvegin ikki vistu av, at Karsten Hansen ikki fór at góðkenna sáttmálan, so stendur leiðslan í SEV við einum stórum trupulleika. So hevur hon nevniliga ikki kunnað stýrislimirnar nóg væl um, hvørja støðu Karsten Hansen hevði í hesum málinum.

Nú verður bólturin so spældur yvir til umboðsnevndina, sum eigur næsta leikin.

# High risk á Tórsvølli

**Trygdartiltøkini verða munandi strangari enn vanligt, tá Týskland vitjar á Tórsvølli**

FÓTBÓLTUR
*Heri á Rógvi*




*Umboð fyri Tórsvøll, løgreglu og Fótbóltssambandið løgdu týsmorgunin fram ætlanirnar í sambandi við landsdystin móti Týsklandi*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Mikudagurin 11. juni verður eftir øllum at døma ein serligur dagur. Tá fer føroyska A-landsliðið hjá monnum á Tórsvøll at spæla móti Týsklandi.

Og hetta fer at merkjast.

Trygdartiltøkini vera munandi strangari enn vanligt er til landsdystir á Tórsvølli. Orsøkin er tann, at hesin dysturin verður mettur sum ein “High-risk” dystur. Og orsøkin til hetta heitið er Týskland. Allir dystir hjá týska fótbóltslandsliðnum verða mettir sum high-risk orsakað av áskoðarunum. Og hóast øll vóna og kanska rokna við, at alt fer at spæla væl av, so hevur føroyska løgreglan fingið at vitja, at um fimmti sokallaðir hooligans kunnu vera á veg til Føroya í sambandi við dystin.

### Einki við

Trygdartiltøkini til dystin fara millum annað at merkja, at hvør einstakur áskoðari verður visiteraður av vaktunum við vøllin. Gongur tú sum áskoðari ikki við til hetta, hevur tú spilt tær pengarnar fyri atgongumerki. Og tað einasta fólk hava loyvi at taka við eru “bleytir” lutir, eitt nú fløgg. Ongar fløskur, rúsdrekka, trummur ella lutir, sum kanska verða nýttir til at stuðla liðnum við, eru loyvdir inn á Tórsvøll mikudagin 11. juni.

Tað er væl og virðiliga útselt til dystin, umleið 6.000 áskoðarar, verður upplýst hjá Fótbóltssambandinum. Eitt er, at útselt er. Eitt annað er so, at áhugin allastaðni frá er ógvuliga stórur. Eitt stórt lið av fjølmiðlafólki og øðrum koma til Føroya til dystin.

Eisini fíggjarliga fer hesin dysturin at geva FSF slætt borð, eftir seinnu árini við heldur svikaligum úrslitinum.

### Løgreglan

Til ein tílíkan high-risk dyst er eisini neyðugt við nógvum trygdarfólkum Talið av vaktum við vøllin er tvífaldað, og løgreglan hevur fyrireika ein størri innsats til dystin. Heili seksti danskir løgreglumenn koma til landið fyri at hjálpa til við trygdartiltøkunum í sambandi við dystin.

600 týskir áskoðarar hava atgongumerki til dystin. Hesir fara at sita fyri seg á langsíðuni við húsið í syðra endanum.

Stóra løgregluliðið fer at ansa eftir hesum, men eisini øðrum fólkum. Hildið verður fast um, at øll fáa somu viðferð.

Og tað verður ikki bert til dystin, at fólk fara at leggja til merkis stórt løgreglulið. Tað verður í eina góða viku.

Royndir aðrastaðni frá, at teir flestu tilburðirnir henda áðrenn ella eftir dystin aðrastaðni enn á stadion. Tískil hevur løgreglan sett eyka fólk á vakta fleiri staðni í Føroyum. Hetta verður bæði gjørt við fólki til gongu og í bilum.

Soleiðis fer løgreglan at vera munandi meira sjónlig í føroyska landslagnu í vikuni, tá Føroyar og Týskland hittast á Tórsvølli.

Løgreglan fer harumframt at hava eftirlit við serliga Norrønu. Passeftirlitið verður framt umborð, og fólk, sum onga orsøk hava at vera í Føroyum, sleppa heldur ikki til landið.

Fólk kunnu, um tey vilja, selja síni atgongumerki til týskarar. Men roknað verður ikki við, at hetta er sannlíkt, tí fólk hava kappast um at fáa fatur á hesum, og hesa upplivingina vilja fólk hava við, verður hildið.

Nøkur atgongumerki eru send út, og tey flestu verða send, soleiðis at fólk hava tey eina lítla viku áðrenn dystin.

Hetta verður gjørt fyri at forða sølu millum manna.

### Hugna sær

À tíðindafundi týsmorgunin vóru umboðini fyri Tórsvøll, FSF og løgregluna á einum máli um, at eingin eigur at vera bangin fyri dystinum, og øll eiga at kenna seg trygg.

Týdningarmikið er, at fólk nýta hetta upplivilsi, sum kanska ongantíð verður aftur í Føroyum, varð sagt á tíðindafundinum.

Men trygdartiltøkini eru herd munandi, og hetta skulu fólk hava virðing fyri, um dysturin skal gerast ein uppliving.

Ein annar munur verður eisini, at tað ikki longur er møguligt at ganga við vøllin. Tórsvøllur verður býttur í zonir, sum hava hvør sína inngongd. Toilet og aðrar fasilitetir verða til hvørja zonu.

Ikki alt er komið upp á pláss við Tórsvøll orsakað av verkfallinum, men tað verður á heilt góðari leið til dystin, verður roknað við.